

## Obama vann fyrsta valstaðið

Barrack Obama vann valið í Dixville Notch, og tað er fyrstu ferð í 40 ár, at eitt demokratiskt forsetavalevni vinnur har. Eins og undanfarin val var Dixville Notch í New Hampshire tað fyrsta valstaðið, sum kunngjørdi úrslitið av forsetavalinum. Tað vísti, at Barrack Obama fekk 15 av teimum 21 atkvøðunum. John McCain fekk hinar seks. Tað merkisverda við úrslitinum er sambært AP, at hetta er fyrstu ferð síðani 1968, at tað demokratiska forsetavalevnið vinnur í Dixville Notch. Ta ferðina vann Hubert Humprey har á Richard Nixon. Valluttøkan í Dixville Notch var 100 prosent.

# Orðblind skulu fram í



*Tann stóri lærarin er hann sum viðgongur, at hann ikki røkkur næminginum, men sum kannar, hvussu vit kunnu hjálpa barninum kortini, sigur Hans Pauli Christiansen, sum er leiðari á einum skúla fyri vaksin orðblind í Albertslund*

**Fólk, sum eru orðblind, hava ofta upplivað so nógvar ósigrar í lívinum, at tey hava mist sjálvsálitið. Men tað er ongin skomm at vera orðblindur, og fyrsta stigið á leiðini er at viðganga trupulleikan og síðani at søkja sær hjálp – tí hjálpin er ofta nærri enn vit halda**

UNDIRVÍSING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Ofta verður sagt, at orðblindi er eitt dult brek. Men hin orðblindi skal rópa hart og krevja sín rætt, tí í dagsins samfelag nýtist orðblindi hvørki at dyljast ella at vera eitt brek. Saman við opinleika, ber í dag til at bøta somikið væl um trupulleikan, at hin orðblindi kann virka í einum gerandisdegi, har skrivaða orðið hevur so ómetaliga stóran týdning.

Hetta var høvuðsboðskapurin á ráðstevnu, sum Felagið fyri lesi- og skriviveik skipaði fyri í Gjáargarði fríggjadagin í farnu viku. Á ráðstevnuni talaði millum Hans Pauli Christiansen, sum er formaður í danska orðblindafelagnum og leiðari av einum skúla fyri vaksin orðblind í Albertslund.

- Orðblind eru ikki býtt. Men økið er framvegis nógv tengt at tabu, hóast vit í roynd og veru kunnu røkka teimum allar flestu. Størsta avbjóðingin er ofta at byggja næmingarnar upp sálarliga, tí teir hava mist sjálvsálitið í fólkaskúlanum, sigur Hans Pauli Christiansen, sum ynskir fullan opinleika um evnið.

### Falla í fátt

Roknað verður við, at fimm prosent av fólkinum hevur sera trupult við at lesa, meðan tvey prosent hava brúk fyri serligum undirvísingartilboði.

Ordblindi endar ofta við at vera ein sosialur trupulleiki, sum fylgir einum restina av lívinum, um neyðuga undirvísingin ikki verður sett í verk. Tann orðblindi kennir tað ofta, sum dugur hann ella hon ikki tað sama sum hini og bæði sjálvsvirðið og sjálvsálit minka. Eisini reagera tey ofta við vreiði ella sorg.

- Næmingarnir missa sjálvsálitið og falla í fátt. Tað er ikki er løgið at teir skammast, tí teir hava liðið so nógv niðurløg, sigur Hans Pauli Christiansen. Hann vísir á, at hetta serliga hendir, tí lærarar ikki vita, hvussu teir skulu røkka barninum. Tá íkoma hesar keðiligu støðurnar, har barnið krógvar seg undir borðinum, sovnar, ger ónáðir ella verður brigslað, tí tað biður síðumannin um hjálp.

- Men sjálvandi reagera børnini, tá tey fáa niðurløg oman á niðurløg, sigur Hans Pauli Christiansen, sum samstundis staðfestir, at tann stóri lærarin er hann sum viðgongur, at hann ikki røkkur næminginum, men sum kannar, hvussu til ber at hjálpa barninum kortini.

### Fleiri tilboð

Hans Pauli Christiansen sigur, at tað er ein samfelagsuppgáva at bjóða orðblindum undirvísing – bæði børnum og vaksnum. Samstundis viðgongur hann, at vit her í Føroyum enn eru langt eftir á mál, tí tilboð eru ikki til øll. Tó fegnast hann um, at økið verður nevnt í samgonguskjalinum og at ítøkiligar ætlanir eru um at seta barnaskúla fyri orðblind á stovn í Havn, har 40 næmingar úr øllum landinum kunnu ganga. Harumframt vísir hann á arbeiðið, sum verður gjørt í Alvskúlanum við Áir, har vaksin lesi- og skriviveik